## B36 og KÍ uppalt flest

B36 og KÍ hava uppalt flestar av spælarunum, sum í farna kappingarári spældu í Vodafone-fótbóltsdeildini. Tað vísur ein kanning, sum FSF hevur gjørt. B36 liggur ovast á listanum við 20 spælarum, og síðani kemur KÍ við 19 spælarum. HB er trið á listanum við 17 spælarum, og síðani koma ÍF og NSÍ, sum hava uppalt 16 av spælarunum, sum spældu í Vodafone-deildini farna kappingarár.



## Nógvir spæla við barndómsfelagnum

Hóast føroyskir fótbóltsspælarar dúgliga skifta millum feløg, so spælir størsti parturin av teimum framvegis í barndómsfelagnum. Ein kanning, sum FSF hevur latið gjørt, vísir, at í farna kappingarári spældu tveir triðingar av føroysku spælarunum í Vodafonedeildini við barndómsfelagnum. Hinvegin vísir kanningin eisini, at ein lítil helvt av føroysku fótbóltsspælarunum hevur spælt við meira enn einum felagi í bestu deildini. Av teimum hava átta prosent spælt við fýra feløgum ella fleiri.

## Lásamálið umaftur

**Meira enn nakað er aktuella málið um aðalskrivaran eitt mál, sum við allari sjónligheit vísir, at álitið og samstarvsevnið millum aðalskrivara, forseta og starvsnevnd er slitið upp**

ÍTRÓTTARKLUMMA
*Jákup Mørk*

Hóast fleiri helst vildu vera við, at aktuella málið skuldi kostað aðalskrivaranum starvið, so hevði hetta í sjálvum sær ikki loyst teir heilt nógvu trupulleikarnar. Politiskt amputeraða støðan við einum beinleiðis valdum forseta, sum sat í greiðum minniluta, hevði framvegis verið eins fastlæst, og tí vóru kravboðini til nevndina púra greitt, at fáa betri skil á meira yvirskipað viðurskifti.

Við hesum er ikki sagt, at aðalskrivarin er friðaður, og framvegis eru helst fleiri feløg, sum ynskja aðalskrivaran úr sessinum. Men partvíst vildi ein uppsøgn í verandi løtu skaða umdømið hjá føroyskum fótbólti. Og partvíst vildi eitt grundarlag í aktuella málinum ikki verið nóg gott, tá hægsti UEFA-instansur longu hevur sagt, at málið er loyst við eini »nøs«. Og tí kann føroyska »rættarskipanin« illa flokka málið øðrvísi.

Hinvegin tekna politisku útmeldingarnar útmeldingarnar sína týðuligu vangamynd av einum komandi FSF-forseta.

Talan skal tá verða um persón við royndum innan leiðslu og fíggjarstýring. So ella so skal hann hava verið aktivur innan føroyska fótbóltsheimin. Og havandi í huga kritikkin um vantandi sambandið millum FSF og feløgini, vildi tað ikki verið verri, um viðkomandi hevur royndir frá nevndararbeiði í fótbóltsfelag.

Í so máta tykist talan vera um vangamynd, ið er skræddaraseymað til Kristjan á Neystabø, sum í løtuni er formaður í B36.

Á fundinum leygardagin var hann maðurin, sum stýrdi orðaskiftinum, men hóast hetta er hann ikki við í bólkinum, sum skal gera uppskot um bygnaðarbroytingar. Bæði frá felagsarbeiði og vinnulívi hevur hann royndirnar. Og kanska mest týðandi, so er hann ein bygdarmaður í Havn, og kann tí fáa breiðan uppbakning úr samlaða føroyska fótbóltsumhvørvinum.

Helst bert ein hypotesa, at og sjálvur sigur víkarmaðurin, at hann ikki er tøkur til sessin.



Formansfundurin, sum varð hildin leygardagin, lá longu í kortunum fyri einum mánaði síðani. Lagt er nú upp til friðarliga kollvelting í FSF, har stór útskifting er í væntu næstu tveir aðalfundirnar

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

Formenninir viðtóku á fundinum leygardagin at seta serligan bólk, sum skal arbeiða við bygnaðarbroytingum í FSF. Ætlandi skal bólkurin leggja eitt uppskot til hetta longu fyri jól.
Í bólkinum sita Páll Gregersen, formaður í Víkingi, Niels Juel Arge, formaður í HB, Tummas Lervig, formaður í KÍ, Fróði Mortensen, formaður í FC Hoyvík og Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ.
Á aðalfundinum í februar mánaði í 2010 standa fýra starvsnevndarlimir fyri vali. Teir eru forsetin, Høgni í Stórustovu, Magnus á Stongum, Rúni Heinesen og Sveinur Tróndarson.

# Friðarlig kollvelting ávegis

**Boðini til starvsnevndina um sjálv at loysa sínar trupulleikar eru samstundis eini boð um, at stórar umskipanir eru ávegis í FSF. Men hesar verða gjørdar friðarliga av feløgunum, sum ikki ynskja meira rok í FSF-toppinum**




Jákup Mørk

Tað var ikki bara málið um aðalskrivaran, sum føroysku fótbóltsformenninir fundaðust um á Hotel Hafnia leygardagin.

Sum vit skrivaðu í farnu viku, so hevur ein fundur millum feløgini leingi verið ávegis, og heldur enn at seta fokus á akutta trupulleikan, valdu formenninir at seta siktið hægri, soleiðis at meira grundleggjandi trupulleikar í FSF-bygnaðinum kunnu loysast.

Fyri sovítt ein skilagóð avgerð, tí ein møgulig uppsøgn ella suspendering av aðalskrivaranum hevði ikki loyst politiska trupulleikan – kanska øvut. Tí forsetin hevði tá framvegis virkað í minniluta.

### Óbroytt í 30 ár

Tí veruleikin er, at politiski bygnaðurin í FSF einki er broyttur, síðani felagsskapurin varð settur á stovn í 1979.

Tá var talan meira ella minni um eina víðkaða kappingarnevndin, sum hartil hevði nakrar fáar hundraðtúsund krónur at ráa yvir um árið, umframt at onkur hissini landsdystur eisini var á skránni. Hetta í mun til støðuna í dag, har FSF í sjálvum sær er ein stór fyritøka við árligum umsetningi omanfyri 30 milliónir, har ein heilur hópur av landsliðum hvørt ár taka lut í altjóða kapping, og har ein professionel umsiting er bygd upp.

Tann støðan var kanska haldbær, tá nevndarlimirnir leingi vóru teir somu, og soleiðis kendu felagsskapin út í odd og egg. Politiskt hevur útskiftingin verið stór seinasta 10-ára skeiðið, og tí hevur politiska landslagið ongan sum helst møguleika at fylgja við í eini detailstýring av felagsskapinum. Og nóg illa er hon før fyri at fylgja við á yvirskipaða planinum.

Tí er støðan alt meira blivin tað, at aðalskrivarin – umframt fyrisitingarligu stýringina – eisini hevur havt politisku stýringina um hendi. Og tað er vorðið eitt alsamt vaksandi irritatiónsmoment hjá fleiri av fótbóltsbossunum kring landið.

### Løntur forseti

Enn er ikki heilt greitt, hvussu endaliga loysnin upp á bygnaðarligu trupulleikarnar sær út, men nakrar greiðar ábendingar eru tó kortini.

Ein tykist heilt víst at medda eftir eini størri fakligari profeissionalismu í sjálvari FSF-nevndini. Talan verður um løntan forseta, sum kanska verður valdur fyri fýra ár. Og grundleggjandi kriterium hjá hesum skulu vera fíggjarstýring og leiðsluroyndir. Umframt at pondus, hegni og treiskleiki til at fremja neyðugu broytingarnar er sjálvsagt krav.

Hugsandi er eisini, at undirnevndir ikki longur einvíst verða mannaðar av starvsnevndini. Heldur verður tað so, at ein starvsnevndarlimur er formaður í hvørjari nevnd, og at leikfólk annars verða tikin við í hesar.

Til at halda eftirlit við nevndini er ætlanin, at fastir formansfundir – les partaeigarafundir – verða hvønn ársfjórðing, og er talan um størri avgerðir, sum hava avgerandi týdning fyri felagsskapin, eiga hesar at verða lagdar fyri tann fundin.

Og so er at enda lagt upp til, at talan verður um stillisliga útskifting í nevndini yvir næstu trý árini. Lagnan hjá forsetanum ella aðalskrivaranum varð ikki umrødd sum so. Men sæð í ljósinum av aktuella málinum, samskiftinum teirra millum og samstarvstaktini í nevndini annars hetta seinasta forsetaskeiðið, so vil tað vera løgið, um nakar teirra verður sitandi í sessi sínum serliga leingi afturat. Og eingin skal vera bilsin, um fýra – og kanska fimm – av starvsnevndarlimunum p.t. eru skiftir út, tá aðalfundurin í februar mánaði 2011 er farin aftur um bak.

Í so máta var eitt av endamálunum við forsetafundinum at leggja lunnar undir eina friðarliga kollvelting. Eini kollvelting, har bygnaðurin í FSF verður lagdur undir lupp og skipaður av nýggjum. Men har tað samstundis ræður um at fremja útskiftingar við skili. Bæði við atliti til ikki at missa royndir og diplomatisk sambond í alt ov stóran mun, samstundis sum teir persónar, sum verða skiftir út, fáa møguleikan at gera hetta upp á ein snøggan máta.